

## Tjøldrini komin tíðliga í ár

Tá ið tjøldrini koma, er várið í hond, onki er so vist sum tað. Tað kann so ikki merkja annað enn, at veturin longu nú er við at sleppa takinum og at várið er farið at troka hann av. Hóast tað enn er ein lítil mánaður til grækarismessu, sum er 12. mars, tá ið tað var gamalt, at tjøldrini komu, hevur Sosialurin longu fingið tær fyrstu fráboðanina um, at fólk hava sæð ein stóran flokk av tjøldrum. Tað er ein maður í Lopra, sum seinnapartin leygardagin sá ein flokk upp á eini 100 tjøldur koma flúgvandi-og so er bara at vóna at kavin bráðnar, so at tað fer at liggja betri fyri hjá teimum at finna sær nakað til matna. Myndina tók Jóanis Nielsen.

# Sanna fekk skutara í føðingardagsgávu

**Sanna Haraldsen í Sørvági vann skutarin, sum Rás2 lutaði burtur seinnapartin leygardagin**

BURTURLUTING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Seinastu tíðina hevur Rás2 lutað ein skutara frá MC-søluni burtur. Skutarin kostar 15900 krónur at keypa og á skutara-framsýning í Miðlahúsinum í dag, varð vinnarin drigin.

Og tann hepni vinnarin var Sanna Haraldsen í Sørvági, sum nú má ein túr til Havnar í næstu viku eftir vinninginum.

Til stuttleikar kann nevnast, at Sanna fylti 50 í vikuni og hon heldur rimmar føðingardag leygarkvøldið.

Tá ið Anders Berg frá MC-søluni ringdi til hana beint eftir dráttin og fortaldi henni, hvussu skilið varð, bleiv Sanna ovurfegin. Skutarin kemur væl við, tí hon hevur nógv jørn í eldinum, bæði um dagin og um kvøldið, so tað er rættiliga nógv ferðing aftur og fram í Sørvági, men nú kann hon so trilla aftur og fram.

### SMS-lutaseðlar

Skutarin var ikki lutaður burtur við vanligum lutaseðlum. Men hann varð lutaður soleiðis, at fólk kundu senda eitt SMS til eitt ávíst nummar og sosatt tryggjaðu fólk sær, at tey vóru við í dráttinum.

Tað er PAC Consult í Hvalba, sum hevur gjørt hesa SMS skipanina. Hetta er eitt virki, sum nettupp leggur seg eftir at gera SMS skipanir av ymsum slagi, umframt ymsar telduskipanir til virki av alskyns slagi.

Og tað var eisini stjórin á virkinum, Poul Laust Christiansen, sum dróg vinningin seinnapartin leygardagin.

Tað gjørdi hann við at trýsta á ein knøtt á telduni, sum síðani fann eitt tilvildarligt SMS burtur úr teimum mongu túsund, sum høvdu sent og sum sostatt vóru við í lutakastinum.



*Poul Laust Christiansen frá PAC-Consult situr við telduna og dregur hepna vinnaran ímeðan Birgir Waag Høgnesen á Ras2 spentur fylgir við*

## Nógvar rósur fóru um diskin leygardagin

**Valentine-dagurin er eisini komin til Føroyar fyri at vera, men enn er mammudagurin nógvar ferðir størri**

VALENTINEDAGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Leygardagin var valentinedagur og tað er ein av heilt stóru døgunum í árinum hjá blomsturhandlarum uttanlands.

Og nú hevur hesin siður at geva gentuni ella konuni blomstur tann 14. februar, eisini av álvara fingið fótin fastan í Føroyum.

Uttanfyri blómuhandlarnar var nógv ferðsla allan dagin og í Árstíðunum eru tey púra vís í, at hesin siðurin er komin fyri at vera.

Har siga tey, at siðurin at geva blomstur á valentine-degnum tók seg so smátt upp fyri einum fimm, seks árum síðani.

- Tá byrjaðu ungir drongir at keypa rósur tí tað var valentine dagur, sigur Brynhild Gaard Joensen í blómuhandlinum, Árstíðunum.

Rósurnar fingu teir, men tey, sum stóðu aftanfyri diskin, vistu ikki hví so nógvir drongir knappliga skuldu hava rósur sama dag, tí valentine dagin høvdu tey aldrin hoyrt um.

Men síðani eru tey blivin klókari, tí hetta hevur vundið meiri og meiri upp á seg.

Tað eru framvegis mest ungir menn, sum keypa rósir, men teir tilkomnu eru eisini farnir at taka hetta til sín.

Men Brynhild Gaard Joensen sigur, at hóast tey selja nógv á valentine degnum, er mammudagurin seinni í ár nógvar ferðir størri.

Og tá eru blómutyssini eisini nógvar ferðir størri.

Tað, sum nógv mest verður selt av á valentine degnum, eru stakar rósur, sum eru pent pakkaðar inn.



*Valentine dagurin er komin fyri at vera og nógvar rósur fóru um diskin leygardagin. Enn eru tað mest ungir menn, sum keypa rósur heim við, men teir eldru eru eisini farnir at taka hendan siðin til sín*

# Barnalokkari í Havn var falskur alarmur

**Hóskvøldið ringdu uppøst børn á politistøðina í Havn tí at ein maður hevði tikið tvey børn upp í ein bil og tey hildu, at tað var ein barnalokkari. Men tað var falskur alarmur, sigur løgreglan**

FALSKUR ALARMUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hóskvøldið kom rættiligur skelkur á ein riðil av børnum, sum skreiddu uppi undir Varða.

Og tað skilst á fráboðanum, sum Portalurin hevur fingið, at skelkurin hevur verið so stórur, at hetta var stóra samrøðuevni nógvastaðni í Havn fríggjadagin.

Beint sum børnini skreiddu, kom ein maður í bili og tók tvey børn upp og hini børnini hildu, at tað sá so løgið út, at tey ringdu eftir løgregluni, tí tey stúrdu fyri, at tað var ein barnalokkari.

Hann skuldi enntá hava knív í hondini.

Børnini høvdu eisini verið so umhugsin, at tey høvdu tikið nummarið á bilinum, sum fór við børnunum.

Løgreglan fór á staðið, men eftir at hava kannað málið, er hon komin til ta úrslit, at talan var um falskan alarm.

- Tað kom ein bilur á staðið og tvey børn og ein hundur fóru rennandi ímóti bilinum og upp hann sigur løgreglan.

Lagt verður afturat at talan var sostatt ikki um at tvingsil, ella at tey vórðu lokkað upp í bilin.

Hini børnini, sum skreiddu, kendu ikki børnini, sum vórðu tikin upp, so tey vóru ikki úr grannalagnum.

Tíverri høvdu børnini eisini lisið nummarplátuna skeivt, so løgreglan leitaði leingi eftir skeivum bili.

Síðani er ongin fráboðan av nøkrum sum helst slagi komin um hetta, so løgreglan er komin til ta niðurstøðu, at talan hevur verið um ein pápa, sum er komin eftir børnunum.



*Løgreglan kannaði málið, men er komin til tað niðurstøðu, at talan var um ein pápa, sum var komin eftir børnunum*